# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### 90 ára føðingardagur

Í dag, 3. september fyllir Kala Jensen, Sumba, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### 70 ára føðingardagur

5. september fyllir Tummas Ennigarð 70 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Nainu í Kollafirði leygarkvøldið 3. september. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Sunnudagin 4. september verður Fía Øregaard, Fuglafjørður, 80 ár. Opið hús verður í Lonini í Fuglafirði frá kl. 18.00.

### 85 ára føðingardagur

Sunnudagin 4. september fyllir Hjørleif Magnussen, fyrrverandi tollari í Klaksvík, 85 ár. Føðingardagin verður hann at hitta hjá dóttrini á Nýggjaveg frá kl. 16.00-19.00.

### Brúdleyp

Í dag, 3. september kl. 13.30 giftast í Sengeløse kirkju Annbritt Nielsen úr Tórshavn og Kim Klausen úr Søborg. Móttøka verður heima á Sparrebro 4 aftaná vígsluna. Um kvøldið er veitsla fyri innbodnum í Sengeløse Kro.

Í dag, 3. september kl. 14.00 giftast á sýslumansskrivstovuni í Miðvági René Wiberg Joensen, Miðvágur og Stacey Smith, Chilliwack Canada. Døgurði verður fyri innbodnum. Opið hús verður í Missiónshúsinum í Miðvági frá kl. 20.00.

Í dag, 3. september kl. 14.30 giftast í Vágs kirkju, Vima Beck, Lopra og Bjarti Nattestad, Hvalba.

### Gullbrúdleyp

Í dag, 3. september kunnu hjúnini Elsa og Jógvan Petersen, Kollafjørður halda gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða parið, eru hjartaliga vælkomin í Missiónshúsið í Kollafirði millum kl. 10.00 og 14.00.

### Dagurin

**3. september. Seraphia.** Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.

**4. september. Teodosia.** Navnið er helst komið upp í álmanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.

**5. september. Regina**, deyð umleið ár 300. Ung rómversk genta, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.
Navnið er av latínskum uppruna og merkir *drotning*.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 70 ára føðingardegi mínum 13. juni 2005.

**Heilsan Guðrun**

# 25 ára starvsdagar hjá Poul Hansen heilsølu




*Høgni Hansen, stjóri hjá P/F Poul Hansen, saman við teimum trimum starvsfólkunum sum høvdu 25 ára starvsdag 1. september, f.v.: Rúna Petersen, Símun Midjord og Jóannes Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

1. september 2005 kundu trý av starvsfólkunum hjá P/F Poul Hansen heilsølu í Havn halda sín 25 ára starvsdag í fyritøkuni.

Tey vóru Rúna Petersen, skrivstovukvinna, Símun Midjord, skrivstovumaður, og Jóannes Joensen, goymslumaður.

Rúna Petersen, ið er úr Kvívík, byrjaði sum lærlingur á skrivstovuni í 1978. Hon hevur arbeitt á skrivstovuni í tilsamans 25 ár men hevur verið burturfrá inn í millum. Rúna arbeiðir í dag mest við ordramóttøku.

Símun Midjord er vágbingur. Eftir lokna handilsskúlaútbúgving byrjaði hann sum skrivstovumaður 1. september 1980. Símun arbeiðir í dag mest við edv-spurningum og kundabókhaldi.

Jóannes Joensen er argjamaður. Hann byrjaði á goymsluni í 1973. Eina tíð arbeiddi hann á eini goymslu í Norra, men tilsamans hevur hann arbeitt 25 ár í fyritøkuni. Jóannes arbeiðir í dag mest við vøruavgreiðslu, og hevur, eins og Rúna og Símun, drúgvar royndir og eina breiða vitan um sítt arbeiðsøki.

P/F Poul Hansen er ein gomul fyritøka, ið var stovnað í 1927. Í dag arbeiða 75 fólk í fyritøkuni, har av umleið 10 av teimum eru knýtt at virkinum Krás í Hósvík, sum framleiðir døgurðamat og viðskera.

# Álendska mentanarnevndin á vitjan í Margarinfabrikkini



*Álendska mentanarnevndin á vitjan í Margarinfabrikkini*

TÍÐINDASKRIV

Í samband við at Løgtingið í døgunum 1. til 4. september hevur vitjan av álendsku mentanarnevndini, hevði Margarinfabrikkin vitjan av fýra politikkarum og einum embætisfólki úr Álandi. Har greiddi Bogi Andreasen, leiðari, teimum frá umstøðunum hjá Margarinfabrikkini og teimum ungu í Tórshavnar kommunu. Við teimum vóru eisini tríggir løgtingslimir: Torbjørn Jacobsen, John Johannesen og Alfred Olsen. Hesir eru ikki við á myndini.